









## Feliz cumpleaños Roberto!

**Robert McBirnie**, tónleika-idolið og fremsti undirhaldari okkara í eitt mannaminni, fyllir 80 ár.

Robert hevur eisini sett stóran dám á sólorkuseturnar – bæði sum McBirnie og sum hansar 'alter ego' **Jákup Pauli**.

Vit fara í heyst at royna at takka Roberto við manér.

Vit hitta hann í bæði samrøðum, sangi, tónleiki og undirhaldi.



## Tvær megnar songkvinnur

**Herborg Torkilsdóttir** er komin inn á føroyska tónleikapallin sum ein komet. Egnu sangir og løg hennara eru vorðin sonn fólkaogn. Herborg ger fólksligan tónleik, og sangirnir lýsa mangan støður, sum vit øll onkursvegna kenna okkum aftur í.

**Rakul Petersen** hevur spælt gittara og sungið, síðan hon varð tannáringur. Hon er yngst av fýra systrum, sum hon eisini plagar at syngja saman við undir navninum Systrar. Rakul spælir egin løg, men henni dámar eisini væl at tríva í gamlar klassikarar.

**Herborg og Rakul** fara hvør sær og saman at føra fram eina rúgva av egnum verkum, men saman fara tær eisini at spæla country-klassikarar og blandaðan tónleik frá "the good old days"